# Ta› skal vera stuttligt

**Janus Einar Sørensen sigur, at fyri seg er stuttleikin á og uttan fyri vøllin avgerandi fyri hugin at spæla hondbólt. Afturat stuttleikanum hevur hann eisini fingi › møguleikan fyri upplivingum og avbjó›ingum, men enn eigur hann eitt meistaraheiti› í bestu mansdeildini til gó›ar**

PROFILUR
*Or› Jákup Mørk*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Ein av sonnu stjørnuskotunum á føroyska hondbóltshimmalinum seinnu árini man vera kyndilsleikarin, Janus Einar Sørensen.

Frá at hann fyri tveimum árum sí›ani var skiftisleikari vi› avmarka›ari spælití›, fekk hann undanfarnu kappingarár eitt satt gjøgnumbrot, og í ár telist hann so millum føstu álitini á Kyndilsli›num, sum nú strí›ist vi› at vinna seg upp aftur á ovastu tindarnar.

## Gavst á flogbóltslandsli›num

Ta› var annars í Neistanum, at Janus Einar byrja›i hondbóltslei› sína. Hetta komst tó av, at Kyndil ikki hev›i naka› li› fyri tey allar yngstu, men tá aldurin var til tess, so skifti hann til grøna havnarli›i›, har hann so hevur veri› sí›ani.

– Eg spældi so hondbólt allan vegin uppeftir, og í 1998, tá Jacob Jónsson gjørdist venjari, kom eg so vi› í 1. li›shópin.

– Eg hev›i tá júst veri› vi› flogbóltslandsli›num í Danmark, har vit høvdu spælt vi› í NM-kappingini fyri unglingar. Vit komu so aftur um døgur›atí›, og eftir at hava sovi› nakrar tímar, fór eg so ni›an í høllina at venja hondbólt. Man má helst siga, at Jacob tá hevur havt eitt serligt árin á meg, tí í øllum førum, so havi eg ikki spælt flogbólt sí›ani tá, sigur Janus Einar flennandi.

*– So skjótt, sum eg ikki havi ta› stuttligt á vøllinum, so gevist eg*

– Um ta› var naka› serligt vi› Jacob sum so, skal eg ikki siga, men venjingarnar hjá honum vóru ø›rvísi, enn tær eg hev›i roynt á›ur. Harumframt var hetta fyrstu fer›, at eg vandi vi› 1. deild, og hetta var naka› heilt anna› enn at spæla vi› unglingum og dreingjum 16.

– Kanska er ta› eisini ta›, at eg havi brúk fyri eitt sindur av kropskontakt, tá eg spæli. Okkurt av avreagera uppá. Í flogbólti kann eg nóg illa rópa »kom so Janus Einar« uttan at fáa gula korti›, men ta› er so ein stuttlig ítrótt allíkavæl, leggur hann smílandi afturat.

## Skal vera stuttligt

Eitt sum ofta ver›ur lagt til merkis, tá Janus Einar er á vøllinum, er, at hann tykist altí› at hava hug til at skemta eitt sindur. Gera onkrar faktir ella eitthvørt, sum kanska tykjast provokerandi fyri mótstø›uli›i›, men hinvegin heldur eggjandi hjá bæ›i vi›leikarum og ásko›arum.

Sum skilst á vi›leikarunum, so er hetta sama galdandi undir venjing, har hann ber or› fyri at vera sera kátur, men hvat hevur alt hetta vi sjálvt hondbóltsspæli› at gera?

– Eg havi ta› nú einafer› solei›is, at eg má royna at hava ta› stuttligt, me›an eg spæli. So skjótt, sum eg ikki havi ta› stuttligt á vøllinum, so gevist eg.

– Satt at siga, so spæli eg hondbólt av teirri einføldu orsøk, at eg haldi ta› vera stuttligt. Ikki minst, nú vit hava eina somiki› gó›a blanding av eldri og yngri leikarum. Tá ver›ur ta› aloftast solei›is, at tú lærir eina rúgvu, samstundis sum ta› eisini eru stundir til at hava ta› stuttligt, og ta› haldi eg vera serstakliga cool.

Spurdur, um ta› er naka› serstakt, sum hann hevur gjørt fyri at gera venjingarnar stuttligar, sigur hann, at ta› heldur hann ikki.

– Eg kann ikki upp á standandi fót koma í tankar um naka› serstaka beistager›, sum eg havi gjørt í so máta. Ta› eri eg eisini for fittur til at gera. Ta› ringasta hevur kanska veri›, tá hitasalva er smurd í onkrar venjingarbuksur. Ta› er tó ikki eg, sum hava gjørt hetta, og ta› hava so heldur ikki veri› mínar venjingarbuksur.

– Onkuntí› kunnu vit kanska arga Jens (Skipagøta) eitt sindur, solei›is at vit als ikki skjóta har, sum vit skulu skjóta, tá vit hita upp, men annars er ta› ikki so nógv, sum vit gera, me›an vit eru til venjing.

– Ta› er kanska heldur tá vit eru saman uttan fyri vøllin, at vit gera gjøldur burtur úr hvørjum ø›rum.

*– Fyri ein strikuspælara er ta› nærum eitt krav at skora, tá møguleikin er har*

Tá vit eru somiki› nógv saman, so slepst sjálvandi ikki undan at man vi› hvørt flennir eftir hvørjum ø›rum, og ta› er eisini í fínasta lagi. Naka› óreint haldi eg tó ikki, at talan nakran tí› hevur veri› um.

# Profilur

*Janus Einar Sørensen*

*23. februar 1980*

*Spælt vi› Kyndli nærum øll barna- og ungdómsárini*

*Kom á besta mansli›i› á heysti 1998*

*Úttikin til A-landsli›i› á vári 2000*

*Hevur annars eisini spælt á yngru landsli›unum hjá HSF*

*Spældi eisini flogbólt vi› Fram, og kom eisini á unglingalandsli›i›, men gavst til frama fyri hondbóltinum*

*Gongur í løtuni á Hægri Handilsskúla*

## Strikan skal skora

Ásko›ararnir hava kanska eisini lagt til merkis, at ta› serliga er eftir eina skoring, at Janus Einar hevur lyndi at visa seg fyri ásko›arunum.

– Ta› er jú tí man er gla›ur fyri máli›. Kanska eisini tí ta› kennist sum ein lætti, tí fyri ein strikuspælara er ta› nærum eitt krav at skora, tá møguleikin er har. Tá ert tú jú púra fríur, og møguleikin er fyri sovítt størri enn vi› brotskasti, so ta› skal geva mál.

– Eisini haldi eg, at tá nógv mál ver›a skotin av strikuni sigur hetta eitt sindur um li›spæli›. Tú kanst jú síggja Wislander, sum kanska skj‡tur eini 10-13 mál í onkrum dystum á hægsta stigi›. Ta› er ótrúliga stuttligt hjá li›num, samstundis sum ta› eisini ta›, sum pínur eina verju mest, tí tá koma málini jú inni frá økinum, sum verjan eigur at hava.

*– HSF var helst noytt til at vísa, hvar marki› var*

## Gó›ar treytir

Júst hetta vi› li›spælinum og at skora frá strikuni krevur eisini, at leikarar eru á li›num, sum kunnu geva røttu fríspælingarnar.

Á hesum øki kann ikki sigast anna› enn, at Janus Einar hevur veri› heppin. Í síni tí› á kyndilsli›num hevur hann spælt saman vi› tveimum av bestu spælskiparunum í landinum, Jacob Jónsson og Jónleif Sólsker, og er hetta eisini naka›, sum strikuspælarin er fegin um.

– Ja, ta› er fyri sovítt ein framíhjárættur, sum eg havi havt. Ta› gevur mær nógv størri møguleikar, og eisini ein leikari sum Bjarni Wardum er sera gó›ur hjá mær í so máta. Kanska stó› Bjarni eitt sindur í skugganum av Jacob seinasta ár, tí Jacob tók líka sum alla ábyrgdina á sínar her›ar. Har haldi eg, at Jónleif dugir betri at b‡ta uppgávurnar millum leikararnar, solei›is at allir koma til sín rætt.

– Annars haldi eg ikki, at man kann samanbera Jacob og Jónleif, tí teir eru somiki› ymiskir spælarar. Skifti› er so í øllum førum naka›, sum krevur tí› fyri mítt vi›komandi, men nú byrjar ta› so spakuligt at koma. Ta› gjørdi ta› heldur ikki betri, at eg hev›i eina ringa periodu í byrjanini av kappingarárinum, men nú er ta› vi› at koma.

## Steypasigur og landsli›sbo ›

Í landsli›shøpi var ta› ikki alt fyri eitt, tá landsli›i› var› endurstovna›, at Janus Einar var at síggja. Tá hann so fekk bo›ini, stutt undan fyrstu uppgávunum, var ta› fyri hansara vi›komandi eisini púra óvænta›.

– Ta› var ótrúliga spennandi. Ikki minst av teirri orsøk at eg fekk bo›ini beint eftir steypafinaluni, sum er ein tann minnisríkasti dysturin, sum eg nakran tí› havi spælt.

– Ta›, sum kanska hevur mest spennandi í hesum sambandi, er, at man eisini hevur lært hinar spælararnir betru at kenna. At læra, hvussu vit allir kunnu rigga saman uttan fyri vøllin. Ta › er kanska tann stuttligasti parturin av tí.

– Eg haldi, at man kann siga og skriva nógv um leikarar, sum eru nakrir kapasitetir á vøllinum, men ta› er tó ikki fyrr enn eftir dystirnar, at tær veruliga gó›u upplivingarnar vi› hesum koma.

Umframt, at hann solei›is í vár gjørdist partur av A-landsli›num, so var Janus Einar eisini partur av illa gitna U-21 li›num, sum at kalla var› bannl‡st eftir eina Danmarkarfer› í summar. Hetta tí ta› var› mett, at leikararnir ikki høvdu hildi› tær treytir, sum vór›u settar teimum undan fer›ini vi›víkjandi rúsdrekka.

– Eg haldi ikki nú ikki, at sjálv hendingin var so ø›iliga ógvuslig, men hinvegin, so var HSF helst noytt til at vísa, hvar marki› var. Undan hesum hev›i U-20 landsli›i› veri› í Kroatia, har ein spælari so at siga var› gloymdur eftir, tá farast skuldi heim. So alt í alt, so var ta› helst í lagi, at eitt mark var› sett. Vit máttu so bara taka vi› revsingini, sum millum anna› merkti, at vit ikki sluppu vi› á fer›ini til Hvítarussland. Ta › hevur helst eisini skap eina ávísa respekt ímillum spælararnar, solei›is at naka› líknandi ikki endurtekur seg í framtí›ini.

– Ikki tí, spælararnir á landsli›num eru ógvuliga seriøsir, og ta› ver›ur eisini sett krav til okkum um at bera okkum rætt at. Nú hava vit akkurát fingi› venjingarætlanina fram til komandi landsdystirnar, og umframt nógva venjing, so krevst eisini, at vit skikka okkum væl. Einki vi› at fara í b‡in anna› jólakvøld ella á n‡ggjárinum, og ta› er so bara naka›, sum fylgir vi›.

– Vit hava jú allir fingi› eitt val, og vit hava eisini gó›tiki› treytirnar. Aftur fyri rokni eg so eisini vi›, at vit fáa eitt stórt hondbóltsupplivilsi. Tá ber ta› ikki til, at menn drekka sær eina kenning ella meira, fáar dagar á›renn dystirnir skulu leikast.

Nevnast kann í hesum sambandi, at komandi uppgávurnar eru dystir móti Rumenia, Litavia og Sveis. Allir dystirnir ver›a leiktir í Føroyum í januar mána›i.

*– Eg eri 100% vísur í, at um vit ikki vinna meistaraheiti› í ár, so vinna vit ta› næsta ár*

## Upplivingar

Omanfyri ver›ur nevnt, at Janus Einar sjálvur metir steypafinaluna í vár sum eina av størstu hondbóltsupplivingum sínum. Hóast hann enn má metast sum ungur í hesum høpi, so eru longu nú komnar nakrar upplivingar, sum allar helst ver›a verandi í minninum í langa tí›.

– Besti dysturin hjá mær var helst steypafinalan ímóti Neistanum, men harumframt eru sjálvandi eisini a›rar upplivingar.

– Dysturin móti Grønlandi var sjálvandi eisini naka› fyri seg, men umframt steypafinaluna er ta› serliga ein onnur hending, sum eg minnist serliga væl.

– Ta› var tá vit vi› U-18 landsli›num vunnu ímóti Luksemburg. Ta› var ein heilt, heilt fantastisk uppliving. Landsli›sarbei›i› var akkurát byrja, høllin var stúgvandi full av fólki, sum stu›la›u okkum, og alt var bara heilt ótrúligt fyri okkara vi›komandi. Ta› var veruliga naka›, sum gjørdi, at vit á vøllinum undu geva okkum ta› petti eyka.

– Eitt, sum eg kanska kann nevna í hesum sambandi, er tónleikurin, sum ikki longur er at hoyra í Høllini.

– Í Kyndli n‡ttu vit hetta í fjør, og ta› er so avgjørt naka›, sum ger ta› stuttligari at spæla hondbólt. Eisini hóast onkur kanska heldur ta› vera í so hart frá.

– Útger›in, sum Kyndil leiga›i til hetta, er tó ikki tøk longur, og ta› haldi eg vera stórt spell.



*Tá Janus Einar kom á 1. li› hjá Kyndli, gavst hann vi› flogbóltinum, har hann annars var vi› á unglingalandsli›num*

## Ver›a meistarar

At enda spurdu vit Janus Einar, hvørjar vónir ella ætlanir hann hevur framtí›ina hjá Kyndils li›num, sum hann í dag er ein partur av.

– Lat meg siga ta› solei›is, at eg sum so ikki havi nakrar vónir. Hinvegin eri eg 100% vísur í, at um vit ikki vinna meistaraheiti› í ár, so vinna vit ta› næsta ár. Í øllum førum um gongdin framhaldandi ver›ur tann sama, sum hon er í løtuni.

– Vit hava eina gó›a blanding av royndum og ungum leikarum. Fleiri av teimum ungu hava veruliga møguleika til at koma langt, og eingin av teimum eldru er somiki› gamal, at teir skulu avskrivast. Tvørturímóti er ta› framvegis nógv »go« í teimum.

Seinastu or›ini bo›a í øllum førum frá, at hóast vestmenningar í løtuni liggja fremst í landskappingini, so skulu teir als ikki kenna seg vísar í at ver›a hangandi á sessinum. Janus Einar er í øllum førum svangur eftir fyrsta FM-gullinum sí›ani dreingjadeildirnar, og ivaleyst er svongdin eisini galdandi fyri fleiri av li›feløgunum.

*Beint eftir at hava vunni› steypafinaluna í vár, fekk Janus Einar eisini bo› um, at hann var úttikin til landsli›i›*